## Bora í oyðimørkini

Fyri fyrstu ferð er norska oljufelagið Statoil farið undir at bora eftir olju uppi á landi, og felagið hevur valt eitt so fremmant stað sum Sahara-oyðimørkina. Borað verður í einum øki, har eitt algeriskt oljufelag hevur funnið tekin um olju og gass, og Statoil ætlar at bora góðar tríggjar kilometrar niður undir sandin. Statoil eigur 75 prosent av leitingarloyvinum, og almenna algerska oljufelagið Sonatrach eigur hin partin.

## Mistaka seg

Ein nýggj kanning vísir, at rættiliga nógvar norskar virkisleiðslur mistaka seg, tá tær seta fólk í týðandi størv. Næstan 60 prosent av fyritøkunum siga, at tær mistaka seg 10. hvørja ferð, tær seta fólk, og eitt prosent siga, at tey hava mistikið meiri enn aðru hvørja ferð. Kanningin vísir, at í teimum flestu førunumn kemst mistakið av, at umsøkjararnir vísa seg ikki at hava teir eginleikarnar, sum teir søgdu seg hava, tá teir søktu.



*Tavan í Leirvík er gamla Frost. Nýggjasti parturin av virkinum er fremstur á myndini. Hesin er bygdur síðst í áttatiárunum. Nú nýggjur landsvegur kemur beint omanfyri virkið, treingist um*

Mynd: Vilmund Jacobsen

ynski, høvdu verið so nógv størri, um alt varð gjørt av nýggjum.

### Nógv fiskaarbeiði

Jóan Magnus Rasmussen heldur, at enn er ov tíðliga at siga, hvussu hetta árið kemur at vignast fíggjarliga, men hann dylur ikki, at úrslitið verður á eini leið.

- Vit arbeiddu 6.500 tons av gulllaksi í vertíðini í ár, og sølan hevur gingið væl. Nú arbeiða vit upsa, og hóast fiskaprísurin er munandi hægri, enn hann hevur verið, hongur framleiðslan saman.

Á Tavuni arbeiða tey í tvey-skiftivakt, og sum skilst á stjóranum hevur nógv arbeiði verið á virkinum, síðan lagt varð um til upsaframleiðslu fyrr í heyst.

- Nú verður tað so upsi teir næstu mánaðirnar – og í øllum førum til og við apríl mánaða, tá ið gulllaksavertíðin fer at byrja aftur, sigur Jóan Magnus Rasmussen, stjóri á Tavuni.



*- Vit hava teknað skitsur av einum nýggjum virki, og møguleikarnir at byggja virksemi upp eftir okkara ynski, høvdu verið so nógv størri, um alt varð gjørt av nýggjum, sigur Jóan Magnus Rasmussen*

Mynd: Vilmund Jacobsen

Leirvíkar kommuna:

# Ynskir vinnuni bestu umstøður á havnalagnum

**- Politiskt ynskja myndugleikarnir, at samfelagið fær sum mest burtur úr rávøruni, men her í Leirvík verða møguleikarnir hjá Tavuni skerdir, nú landsvegur skal byggjast beint omanfyri virkið, sigur Fríðgerð Heinesen, borgarstjóri í Leirvíkar kommunu**



*– Neyst fella fyri landsvegagerðini, havnalagið verður broytt, og bygdin verður skorin frá havnalagnum. Leirvík verður ikki, sum hon var, sigur Fríðgerð Heinesen, borgarstjóri*

Mynd: Vilmund Jacobsen

FISKAVIRKISVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Vit ynskja, at vinnan í kommununi hevur bestu umstøður at virka undir, men nú vit fáa eina landsvegagerð beint oman fyri Tavuna – við ongari lokarennu, duga vit væl at síggja, at hetta kann koma at avmarka møguleikarnar hjá virkinum til útbyggingar og nútímansgerð.

Hetta sigur borgarstjórin í Leirvíkar kommunu, Fríðgerð Heinesen, sum ásannar, at útróðrarbygdin Leirvík við landsvegi niðast í bygdini ikki verður hin sama eftir, at landsvegurin er komin.

- Neyst fella fyri vegagerðini, havnalagið verður broytt, og bygdin verður skorin frá havnalagnum. Leirvík verður ikki, sum hon var. Tað verður ikki so lætt longur hjá eldri monnum, sum kundu hugsað sær at egnt nakrar línur – ei heldur børnum, at sleppa millum bygdina og havnalagið. Nú vit mugu vit í størri mun enn áður uppføra okkum sum í "stórbýnum", sum borgarstjórin tekur til.

Hon vísir á, at einki serligt verður gjørt, soleiðis at sleppast kann lætt tvørtur um nýggja og ferðslutíka vegin, sum kemur.

- Okkurt fótgangarafelti verður, men sum eg havi skilt, verður einki serligt gjørt burtur úr, sigur hon.

Borgarstjórin leggur dent á, at tað er ein stór misskiljing, um fólk halda, at vegaføringin nú verður líka so trygg og góð, sum um vegurin varð bygdur við lokarennu.

- Fingu vit ætlaðu lokarennuna, hevði bygdin ikki í sama mun verið avskorin frá havnalagnum, og tá hevði landsvegurin heldur ikki í sama mun verið ein bági fyri møguligum útbyggingum av Tavuni.

Fríðgerð Heinesen sigur, at kommunan hevur ikki møguleikar at keypa bygningarnar hjá Tavuni fyri nógvan pening, men tey hava vent sær til Landsverk um møguligt keyp.

- Higartil hevur Landsverk ikki verið positivt, sigur hon.

Borgarstjórin vísir á, at landsmyndugleikarnir ynskja, at samfelagið fær sum mest burtur úr rávøruni, men í Leirvík verða møguleikarnir hjá einum virki skerdir, nú landsvegur skal byggjast beint omanfyri virkið.

- Tavan hevur nógv jørn í eldinum, og vit duga væl at skilja, at leiðslan kundi hugsað sær betri møguleikar á nýggja økinum norðanfyri fiskavirkið hjá Kjartani Joensen.

At enda leggur borgarstjórin dent á, at hon er sera fegin um tað vinnuvirksemi, sum er í kommununi, og hon vónar, at loysnir kunnu finnast, sum gera tað møguligt hjá Tavuni at røkka sínum vinnuligu málum.

- Hóast málið um vegaføringina gjørdist ein stórur vavgreytur, kann eingin siga, at málið ikki er lýst – eisini úr einum vinnusjónarmiði, sigur Fríðgerð Heinesen, borgarstjóri.